# Vit skulu halda fingrarnar vekk

**Hvørki Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum ella Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, vilja skapa sær óneyðugar óvinir**

ARBEIÐSLOYSISSKIPANIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum og Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum halda, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu eiga ALS í frið*

– Higartil hava friður og semja valda og tí eiga vit ikki at skapa okkum óneyðugar trupulleikar.

Tað heldur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í arbeiðsmarknaðarmálum.

Arbeiðsloysisskipanin virkar væl og tí eiga vit ikki at pilka við hana.

Tað heldur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í almannamálum,

Tað eru hesir báðir landsstýrismenninir, sum hava mest við ALS at gera.

Og teir halda báðir, at Arbeiðsloysisskipanin skal varðveitast, sum hon er.

Annars viðgerð Løgtingið í løtuni eitt uppskot, sum rættiliga hevur loypt øði í partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

– Verður uppskotið sett í verk, merkir tað í roynd og veru, at ALS verður avtikið, tí ætlanin er at atka skipanina frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og leggja hana undir politisku skipanina.

Hetta fekk partarnar á arbeiðsmarknaðinum at mótmæla hvassliga í løgtinginum í gjár.

Og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður heldur ikki, at løgtingið eigur at skapa sær óneyðugar óvinir.

Hann vísti á, at ALS er ein skipan, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava umsitið við hepnari hond.

Eftir hansara bestu sannføring, er ALS ein skipan, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga.

– Talan er um eina skipan, sum í nógvar mátar er ein fyrimynd fyri skipanir í øðrum londum, tí hon hevur tikið hond um tey, sum missa arbeiði, men hon hevur kortini ikki eggja til, at fólk lata vera við at arbeiða fyri at liva av skipanini.

Hann vísti á, at tað eru partarnir á arbeiðsmarknaðinum, sum sjálvir hava lagt rygg til skipanina og eru orsøk til, at hon virkar so væl, hon ger.

– Tá ið partarnir á arbeiðsmarknaðinum metir hetta, sum sína skipan, merkir tað sostatt eisini, at politiska skipanin hevur verið leys av ALS.

Bjarni Djurholm legði tí dent á, at finnur Løgtingið upp á at allýsa inngjaldið til ALS sum ein skatt, sum bara Løgtingið kann krevja, soleiðis at partarnir á arbeiðsmarknaðinum missa ræðið á ALS, fer tað at elva til trupulleikar.

Hann minti eisini á, at seks løgfrøðingar hava viðgjørt málið, um ALS er ein skattur og sostatt eigur at vera á fíggjarlógini.

– Fýra av teimum komu til ta niðurstøðu, at tað var ikki brot á stýrisskipania, at ALS sjálvt krevur gjøldini inn. Hinir báðir komu til ta niðurstøðu, at tað var ikki ólógligt, at ALS kundi áseta inngjaldsprosentið.

Landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum vísti á, at partarnir á arbeiðsmarknaðin taka ALS í størsta álvara.

– Og tað er umráðandi, at vit halda partarnir á arbeiðsmarknaðinum upp at okkum og ikki styggja teir frá okkum, helt hann

Hann helt tí, at tað var neyðugt, at koma til eina niðurstøðu um, hvussu inngjaldið til ALS skal allýsast.Men tað má ikki gerast so, at vit grava veitir, men halda partarnir í arbeiðsmarknaðinum upp at okkum.

– Politiska skipanin hevur nógv torfør mál at loysa og tí mugu vit ikki skapa okkum óneyðugar trupulleikar

Tí heitti Bjarni Djurholm á fíggjarnevndina um at taka hetta í fullum álvara.

– Arbeiðsmarknaðurin hevur ikki altíð staðið saman, men í hesum føri valdar friður og semja og tað eiga vit at varðveita, segði Bjarni Djurholm.

– Tí mugu vit fáa eina loysn, sum ikki styggir arbeiðsmarknaåðin frá okkum og ger støðuna truplari, men finna eina skipan,sum gongur pørtunum á arbeiðsmarknaðinum á møti, legði hann afturat.

### ALS skal varðveitast

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, vissaði um, at tað liggur ikki í kortunum, at ALS skal ognartakast.

Hann helt, at ALS er ein skipan, sum virkar væl og hann gjørdi greitt, at hon eigur avgjørt ikki at verða løgd á fíggjarlógina.

Hann vísti eisini, at, at tað ber til at varðveita ALS sum eina skipan, ið liggur uttanfyri fíggjarlógina. - Og tað eiga vit at gera, segði hann.

Hann vísti eisini á, at verður ALS løgd á fíggjarlógina, fer hetta er gera sveiggini á fíggjarlógina og landsbúskapinum enn størri enn tey eru í dag og tað helvur hann vera óheppið.

# Stúra fyri at politikarar fara at taka pening frá ALS

**Leggja politikarar arbeiðsloysisskipanina frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, talar alt fyri, at hann fer at verða brúktur til onnur endamál enn tey arbeiðsleysu**

ARBEIÐSLOYSISSKIPANIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Skal politiski myndugleikin taka valdið í ALS, er stórur vandi fyri, at peningurin hjá ALS fer at verða brúktur til onnur endamál, enn tey arbeiðsleysu.

Tað stúra summir tingmenn fyri.

Ein av teimum, sum stúrdi fyri hesum, var Kristian Magnussen, formaður javnaðarfloksins á tingi.

Yvirhøvur eru tinglimir so ivasamir um ætlanina at taka ALS frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og leggja hana undir politisku skipanini, at tað er nógv, sum talar fyri at partarnir á arbeiðsmarknaðinum fáa sín vilja og sleppa at varðveita skipanina í frið.

Annars viðgerð løgtingið í løtuni eitt uppskot, har tað ber í sær, at inngjaldið til ALS skal metast sum ein skattur og eigur at verða tikin frá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og lagdur á fíggjarlógina.

Kortini verður lagt afturat, at vil Løgtingið, ber tað til at gera serskilda lóg fyri ALS, so at partarnir á arbeiðsmarknaðinum slepp at varðveita hana, soleiðis sum teir hava kravt.

Og tað vísir seg, at politikarar úr øllum flokkurum eru opnir fyri, at partarnir á Arbeiðsmarknaðinum varðveita ALS í frið.

### Og hjá summum var tað ein treyt

Greiðastir í sínum útsøgnum, var Kristian Magnussen í javnaðarflokkinum.

Hann helt, at verða ALS og aðrir grunnar, eitt nú barsilsskipanin og sjúkrakassarnir, tikin inn á fíggjarlógina er stórur vandi fyri, at tá peningur manglar til okkurt endamál, so verður peningurin tikin til tey endamálini

Hann helt, at tað bar brá av maktnýtslu, tá ið ætlanin nú er at leggja ALS á fíggjarlógina, tí áður hevur meirilutin av einum løgfrøðingabólki staðfest, at ALS kann varðveitast, sum tað er.

– Kortini er ætlanin at gjøgnumtrumfa, at ALS skal á fíggjarlógina.

Hann helt, at Løgtingið skal taka neyðug atlit til partarnar á arbeiðsmarknaðinum, sum føla, at teir eiga ALS.

– Vit sleppa ikki undan, at ALS hevur eina serliga støðu í føroyska samfelagnum og tað skulu vit fyrihalda okkum til.

Hesum var javnaðarmaðurin, Vilhelm Johannesen, púra samdur í.

Ogtaðer John Johannessen, tingmaður javnaðarfloksins, somuleiðis.

Hann helt, at tað var í stríð við politiska viljan, at taka ALS frá pørtunum á Arbeiðsmarknaðinum.

Hann átalaði eisini, at málið hevur ikki verið til hoyringar hjá nøkrum, hvørki politisku flokkunum ella nøkrum øðrum.

Hevði tað komi til hoyringar, hevði javnaðarflokkurin greitt afturvíst ætlanini at leggja ALS á fíggjarlógina, segði hann.

Lisbeth Petersen úr sambandsflokkinum, helt, at løgtingið má gera greiðar reglar fyri, hvat er skattur og ikki.

Altjóða lýsingin av hugtakinum skattur, er, at tað eru øll gjøld, sum verða kravd, uttan at beinleiðis mótveiting verður latin afturfyri. Sjálv helt hon ikki, at ALS er skattur.

Men vil løgtingið tað, ber til, at gera reglar fyri at ALS skal vera uttanfyri politisku skipanina

Kaj Leo Johannesen úr sambandsflokkinum staðfesti, at ætlanin er ikki at ognartaka ALS, men tað er neyðugt at semjast um, hvat er skattur ella ikki og tað skal gerast, uttan at gera seg inn á tær skipanir, sum eru á arbeiðsmarknaðinum

Annfinn Kallsberg úr fólkaflokkinum, segði, at ongin í Løgtinginum vil ognartaka ALS og hann helt, at ALS skal varðveitast sum ein skipan, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum vara av.

Men hann helt, at Løgtingið hevur skyldu at útgreina, hvat er skattur ella ikki, so at ongin ivi er.

Jenis av Rana úr miðflokkinum helt at ongin orsøk er til at leggja ALS undir fíggjarlógina og Johan Dahl úr sambandsflokkinum segði, at tað er umráðandi at finna eina skipan, sum allir partar eru nøgdir við og Kári P. Højgard úr sjálvstýrisflokkinum, tekur eisini undir við, At ALS verður varðveitt uttanfyri politisku skipanina.

Høgni Hoydal úr tjóðveldisflokkinum, helt, at politikarar eiga at gera seg greitt, hvat vit vilja og so laga lóggávu og hugtøk eftir tí.

Páll á Reynatúgvu ivaðist ikki í, at nevndin, sum fer at viðgerða uppskotið víðari, hevur virðing fyri arbeiðsmarknaðin og kann koma við einum úrsliti, sum viðurkennur, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum eru ein sjálvstøðugur partur í føroyska samfelagnum.